

*Pauli Einarsson á Tvøroyri er nýggjur formaður í Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag*

## Pauli er nýggjur formaður

Suðuroyar Norðara Javnaðarafelag hevði aðalfund í desember. Ketty Andreasen, sum hevur verið formaður í felagnum í nógv ár, legði formanspostin frá sær. Pauli Einarsson tók við sum nýggjur formaður í felgnum. Við á fundinum var Løgmaður. Hóast ikki nógv fólk var møtt til fundin, var lívligt kjak um politisku støðuna í landinum, sigur felagið í tíðindaskrivi Løgmaður umrøddi mál, ið hava verið til politiksa viðgerð og svaraði annars spurningum, ið fundarfólki setti.

Eftir aðalfundin sær nevdin, hjá Suðuroyar Norðara Javnaðarafelag, soleiðis út: Pauli Einarsson er formaður, Nita Næs er næstformaður, Solveig Bærentsen er kassameistari og Maud Næs er skrivari. Hini í nevndini eru Ketty Andreasen, Jens Johannesen, Poul B. Olsen og Jacob Ludvig.

# Støðan er á eini leið

**– Støðan kundi verið betri, men er kortini ikki so galin. Hon er kanska ikki so galin, sum vit høvdu væntað.**

**Soleiðis sigur ein, ið var við í ferðaliðnum frá Tilbúgvingarstovninum og MRCC og Heilsufrøðisligu Starvsstovuni, sum fríggjadagin kom til Vágs við tyrlu at kanna avleiðingarnar av oljulekanum , sum stavar frá einum av stóru tangunum hjá SEV**

OLJA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Fríggjadagin kom kanningarlið til Vágs við tyrlu at kanna avleiðingarnar av oljulekanum, sum fyri kortum var í einum av stóru tangunum hjá SEV*

Fríggjadagin kom tyrlan til Vágs og hon setti seg á Oyrunum í Vági, har orkuverk og oljutangar hjá SEV eisini eru. Ein av tangunum var hol fyri kortum og olja rann á økið kring tangan og fór eisini á sjógv.

Síðani hevur verið arbeitt við lekanum og at reinsa og taka upp.

Men myndir av deyðum og oljudálkaðum fugli í Sosialinum, og myndir av lekanum annars í fjølmiðlunum, fingu fólk frá Tilbúgvingarstovninum og MRCC og Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at seta seg í tyrluna og flúgva suður til Vágs at vita, um tamarhald var á støðuni.

– Beint framvið landi er nakað av olju. Ein sperra lá fyri, men varð síðani tikin burtur, men nú er hon løgd aftur. Sum skilst, so skal grótið beinast burtur og økið reinsast, sigur Suni Petersen, ið var ein í ferðaliðnum frá vitjandi stovnunum.

– Orsøkin til, at vit komu við tyrlu var, at vit skuldu suður og norður aftur sama dag. Vit komu eftir egnum ynski, tí vit ivaðust eitt sindur í, um tamarhald var á støðuni, eftir myndir av oljudálkaðum og deyðum fugli í Sosialinum, og myndir av dálkingini annars í fjølmiðlunum, sigur Suni Petersen.

– Støðan kundi verið betri, men er kortini ikki so galin. Hon er kanska ikki so galin, sum vit høvdu væntað, sigur hann.

Stovnarnir fylgja nú við, hvussu leikur fer í Vági.

Kommunurnar hava ábyrgdina, tá dálking er inni á firðunum, men Tilbúgvingarstovnurin hevur yvirskipaðu ábyrgdina og skal kanna eftir, at kommunurnar gera sína skyldu.

## Hátíðarhald í Kollafirði

**Leygardagin 20. januar verður stórt hátíðarhald í Kollafirði, tá skúlin, ítróttarhøllin og nýggja læknamiðstøðin alment verða tikin í nýtslu**

BYGGING
*tíðindaskriv*

Hátíðarhaldið byrjar í skúlanum klokkan 13.00 leygardagin 20. januar, har børn úr Kollafjarðar skúla fara at syngja í tveimum umførum, og Karin Hammer, skúlaleiðari, heldur røðu. Eisini fer Hildur Euyðunsdóttir, formaður í mentamálanevndini hjá Tórshavnar Býráð at halda røðu.

Klokkan 14.30 verður nýggja læknamiðstøðin sýnd fram fyri almenninginum. Har fer Katrin Dahl Jacobsen, formaður í sosialu nevnd Tórshavnar Býráðs, at taka ímóti.

Klokkan 15.00 verður hátíðarhald í ítróttarhøllini, har Heðin Mortensen, borgarstjóri, fer at halda røðu, og Jens Marni Hansen fer at syngja og spæla í tveimum umførum. Eisini fara Vagnur Johannesen, umboð fyri hallarnevndina, og Jákup Dam, formaður í Kallafjarðar Ítróttarfelag, at halda røðu.

Hátíðarhaldið í Kollafirði endar við hondbóltsdysti í ítróttarhøllini, har KIF og Kyndil fara at spæla dyst í Atlantic Airways kappingini. Dysturin er samstundis steypadystur.

# MBT-skógvurin

**Fyri fyrstu ferð ber nú til at fáa MBT-skógvar Nú er fyri fyrstu ferð MBT-skógvarnir komnir til Føroya**

HEILSA
*Steintóra Joensen*

Hesir skógvarnir gera nógv sum ein vanligur skógvur ikki ger. MBT, ið stendur fyri Masai Barefoot Technology, hava tann munin, at tá tu ert í teimum, er tað sum at ganga á sandi ella í mosa. Musklarnir strammast í búkinum, beinunum og aðrastaðni í kroppinum. Samstundis fært tu ein betri holning og eitt betri gongulag.

Tað var Karl Múller úr Sweis, sum undraðist yvir, hví afrikanarar aldrin høvdu pínu í rygginum, og fann fram til, at tað var tí tey gingu úti í ongum skóm hvønn dag. Hann fór so undir at framleiða ein skógv, við einum serligum botni. Botnurin var gjørdur so, at tá tú gekk í skógnum, var tað sum at ganga í ongum skóm á sandi.

Fólk ið hava roynt skógvarnir siga, at munurin er tann, at tá tú ert í teimum, brúkar tú nakrir musklar í kroppinum, sum tú ikki brúkar vanliga, og av tí styrkist kroppurin sum heild. Summi siga at tey hava tapt seg, og summi siga eisini, at ryggproblemir er horvin vegna nýtslu av MBT.

Skógvarnir kunnu ikki keypast á alnótini ella via postkrav nakrastaðni í heiminum, tí fyri at brúka skógvarnir krevur tað at ein sum hevur verið á skúla hjá MBT, vegleiðir teg í hvussu teir skulu nýtast.

Skógvarnir fáast í Ergo í Havn.




*MBT-skógvarnir eru serstakliga væl egnaðir til folk, sum hava ringan rygg*

*Mynd: Jens Kr. Vang*